gult cyan magenta svart



# Turt tvøst og whisky – tað er heilt vælsignað

*Vit hava bara siglt í 37 tímar og so koma vit til eitt púra fremmant land. Tað er herligt, siga tveir skotskir bygdarmenn, sum hava verið í Føroyum í eina viku*

ÁKI BERTHOLDSEN

– Tað er undarligt at hugsa sær: Vit skulu bara sigla í 36 tímar, so koma til til eitt púra fremmant land.

Teir báðir skotarnir, sum brúktu seinastu viku uppá at rundsigla Føroyar, eru nokk so bilsnir av tí, teir hava upplivað.

Tað eru 10 ár síðani at Donald Mackenzie ognaði sær tann 34 føtur langa seglbátin Flying Cloud, men hetta er fyrstu ferð, hann er uttanlands við honum.

Við sær á hesa „váðaferðina" hevur hann fingið vinmannin og útróðrarmannin Graham Mcfeat.

Annars plaga teir bara at sigla ímillum tey ymsu plássini í útnyrðingsskotlandi. Men í ár skuldi tað vera, at ter skuldi royna okkurt nýtt.

– Tað skerst ikki burtur, at fólk vóru ovfarin, tá ið vit søgdu, at vit ætlaðu okkum til Føroyar. Nógv hildu, at tað var váðaverk, tí tað var so langt burtur.

– Men so merkiligt kann tað vera: Føroyar tykjast so fjarskotnar. Men tað tók bara góðar 36 tímar at koma higar við segli. 36 tímar, so ert tú í einum heilt fremmandum landi. Tað er herligt, siga teir báðir.

Teir fóru úr heimbygdini í skotsku oynni Seil og sigldu fyrst til Stornoway.

Seinasta sunnukvøld settu teir so kós ímóti Føroym og komu til Vágs týsmorgunin.

Síðani hava teir vitjað á Tvøroyri, í Sandvík, ymsastaðni í Sandoynni og so ætlaðu teir sær heilt norður til Fugloyar og Svínoynna, umvgis Havnina, áðrenn teir settu kósina heimeftir aftur.

– Hetta er ein nógv betri máti at ferðast uppá enn at fara við einum ferðalagið, har alt er lægt til rættis frammanundan, tí uppá hendan mátan kemur tú at kenna landið, sum tú ferðast í, sum tað veruliga er.

Og tú kemur nógv lættari í samband við vanliga fólki.

Tað gjørdi tað helst ikki verri, at teir báðir vóru rættiliga væl fyrireikaðir.

Teir vóru betri kunnaðir um føroysk viðurskifti og føroyska søgu enn miðal ferðamaðurin er.

At teir vóru rættir skotskir bygdarmenn, gjørdi heldur ikki støðuna verri, tí tað gjørdi uttan iva sítt til, at teir komu skjótt á bylgjulongd við føroyskar bygdarmenn.

Ikki minst børnini, sum flokkaðust rundanum teir.

Og tey fingu eisini løn fyri áhuga, tí skotarnir býttu gávumildir bæði sjokolátu, kips og sodavatn ímillum børnini.

Og í práti við teir báðar fryntligu skotarnar gjørdust skjótt greitt, at lívið í Føroyum nú á døgum líktust rættiliga nógv lívinum á bygd í Skotlandi fyrr í tíðini.

Og táið teir vóru inni í teimum gomlu húsunum í Sandvík, sum eru friðað og verða brúkt til savn, kendu teir báðir teir allar flestu lutirnar aftur, og vistu, hvat teir vóru brúktir til.

–Tit hava varðveitt nógv av tí, sum vit hava mist, søgdu teir. Eitt nú greiða teir frá, at fyrr í tíðini var tað vanligt at hava hjall í Skotlandi, og tí hildu teir tað verða stuttligt at í Føroyum stóðu hjallar næstan á hvørjum horni.

Tað var í bestu lundatíð, at teir komu higar og teir greiða frá, at fyrr í tíðini var tað eisini vanligt hjá teimum at eta lunda.

Og so er tað grindin.

Føroyingar hava ikki einkarrætt uppá at drepa grind. Tað eru ikki hálvtannað hundrað ár síðani, at seinasta grindin varð dripin, har teir búðu og tað eru ikki hundrað ár síðani, at seinasta grindin legði beinini í Hetlandi, siga teir.

### Ikki rættsiktaður

Nú teir sjálvir umrøða evnið, slepst ikki undan at spyrja, hvat teir halda um gindadráp í Føroyum.

Tað halda teir, er púra natúrligt.

Bæði Donald og Graham semjast skjótt um, at Paul Watson er ikki rættsiktaður og tað einasta, hann er úti eftir, er at seta ljóskastaran á seg sjálvan.

Teir halda, at tað hevur týdning, at fólk liva av natúruni.

–Tey, sum ikki gera tað, missa sambandið við natúruna.

Eitt nú halda teir, at tað er ein vansi, at nógv stórbýarbørn ikki hava ánilsi av, at mjólkin tey drekka, er undan kúm.

– Fólk eru eisini ímóti øllum møguligum. Og hvør sigur, at lívið á einum hvali er meiri vert enn lívið á einum svíni? spyrja teir.

–Annars er tað vanligt í stórídnaðinum at fóðra neyt við deyðum neytum. Tað haldi eg er nógv meiri í stríð við natúruna. og hvat hava vit fingið burturúr: Neytaøði og Jacob-Kreutzfeldt, sigur Graham. Donald tekur fult undir.

Tað, teir sipa til, er, at tað er vanligt at mala deyð neyt og deyðan seyð til mjøl at geva livandi neytum.



*Tað tekur bara 36 tímar undir seglum at koma til Føroyar. Tað er herligt halda Donald og Graham*

### Turt tvøst og whisky

Teir báðir vóru heldur ikki bangnir fyri at royna føroyskan mat.

Á Tvøroyri høvdu teir fingið turt tvøst, og tað dámdi teimum avbera væl.

– Turt tvøst og whisky riggar ómetaliga væl saman.

– Eg haldi, at turt tvøst skuldi verðið selt á pubbunum heima, tí tað er so salt, at tað hóskar sera væl afturvið whisky.

– Ein verður so vælsignað tystur av tí, siga teir, og flenna í kíki.

Sjálvur hevði Donald fingið smakk fyri turrum mati í Týsklandi, har hann arbeiddi eitt skifti í sínum ungu døgum. Í Týsklandi hevði hann fingið turt svínakjøt, sum tey brúktu har.

Hinvegin hevði Graham ongantíð roynt nakað slíkt áður.

Í Hvalba keyptu teir sær eisini turran fisk og í Sandvík vóru teir so hepnir at fáa ein turran spikbita frá klokkaranum.

Donald át turt tvøst, fisk og spik við góðum matarlysti, men Graham var ikki so fegin fyri spiki.

– Tað er ílagi. Meiri verður til mín, svarar Donald aftur. Teir sluppu eisini at royna turt tvøst og skerpikjøt og tað gleið eisini sera væl niður.

So forvitnir vóru teir eftir at royna føroyskan mat, at teir eisini fingu gott eyga á einum grindarivi, sum klokkarin hevði hongt undir hjallin at ræsa.

Men helst vóru tað málsligir trupulleikar, sum spældi teimum eitt puss, tí teir skóru sær ein bita burturav rivinum og ótu tað rátt.

Tað hildu teir smakkaði andskræmiligt og teir søgdu, at tað var tað einasta av føroyskum mati, sum teimum ikki dámdi av tí, teir høvdu roynt,

Men tá ið teir so fingu at vita, at tað skuldi kókast áðrenn tað kundi eta, skiltu teir tað eitt sindur betri.

Annars hildu teir seg vita, at grønlendingar ótu rátt tvøst av nýveiddum kópi og teir hildu, at føroyingar gjørdu tað sama.

Men tað royndina máttu teir so gera sær uppá tann harða mátan.

Donald og Graham settu kósina heim aftur ímóti Skotlandi seinasta sunnudag, eitt stórt upplivilsi ríkar, hildu teir.



*Flying Cloud leggur frá landi í Sandvík, har teir bæði smakkaðu turt spik, skerpikjøt og hálvræst tvøst, sum teir eisini royndu rátt. Graham kveylar lína, áðrenn hann aftur fer niðurundir*



# – Tað besta er náttúran

*Jette Rohdin hevur verið í Føroyum í tveir mánaðir við Nordjobb, har hon hevur fingið betri innlit í føroysk viðurskifti og mentan, men tað besta í Føroyum er tó náttúran, sum er bergtakandi*

STEFAN Í SKORINI

Danin Jette Rohdin er 26 ára gomul, og hon lesur til sosialráðgeva á sosiala háskúlanum í Keypmannahavn. 29. juli kom hon til Føroyar við Nordjobb, og hon skal arbeiða her til 18. august, tá hon fer aftur til Danmarkar, har hon enn hevur hálvtannað ár eftir av útbúgvingini.

Meðan Jette er í Føroyum arbeiðir hon á landssjúkrahúsinum, har hon er húsavørður. Hennara uppgáva er at koyra mat út til sjúklingarnar á teimum ymsu deildunum, og eisini tekst hon við at fáa skitin klæði til høldar.

### Føroyingar eru fyrikomandi

Tá hon verður spurd, hvussu hon dámar arbeiðið og tíðina higartil í Føroyum, er hon ikki í iva.

– Mær dámar heilt avgjørt Føroyar, og eg eri sera glað fyri tað, sum eg havi sæð og upplivað her í Føroyum. Eisini havi eg upplivað tað føroyska gestablídnið, meðan eg havi verið her, og tað haldi eg er sermerkt við føroyingum, sigur Jette, tá ið hon greiðir frá, hvat hon heldur um tíðina her.

Fyri fleiri útlendingar kann tað kennast løgið, at ein fremmandur persónur bjóðar sær til at hýsa tær, og tað beit Jette serliga merki í. Áðrenn hon kom til Føroyar í summar, kendi hon lítið og einki til Føroyar og hevði ikki havt nakað serligt samband hendavegin.

Jette hevur fyrr roynt at sleppa til Føroyar við Nordjobb, men tað er ongantíð eydnast henni at verða millum tey útvaldu, sum sluppu til Føroyar.

Hetta er triðju ferð, at Jette er við Nordjobb, og hon hevur áður verið í Grønlandi og Finlandi. Hesuferð eydnaðist tað so at sleppa til Føroyar, og tað hevur hon verið glað fyri.

– Eg valdi Føroyar, tí at tað er áhugavert fyri meg at koma til hetta landið, sum er so nógv øðrvísi enn onnur Norðurlond. Onnur hava sagt mær, at her er so vakurt, og tí vildi eg síggja tað við mínum egnu eygum.

Hennara meting av føroyingum er, at teir hava kanska minni tjóðskaparliga sjálvsvirðing enn onnur, men tað heldur hon verða løgið, tí eingin orsøk er til tað. Eisini hevur hon lagt merki til, at føroyingar ansa væl eftir sínum máli, sum er heldur torført hjá henni at læra.

Hon er tó skjót at leggja afturat, at tað, sum sermerkir føroyingar, er tað serliga gestablídni og hjálpsemi, ið tey hava møtt her.



*Anne, Johanne, Jette, Laila, Marianne og Viktor á Beinisvørði*

### Náttúruupplivingarnar sita eftir

Meðan nordjobbararnir hava verið í Føroyum hevur ein fríðtíðarleiðari havt um hendi at skipa fyri ymiskum túrum og øðrum. Tey hava verið á øllum teimum vakrastu og mest bergtakandi plássunum í Føroyum. Tey hava verið í Mykineshólmi, Beinisvørði og við báti undir Enniberg, og hesir túrarnir sita eftir í minninum, tá tey koma heimaftur, heldur Jette.

Jette vísir eisini á midnáttarsangin á ólavsøku, sum hugtók hana. Annars heldur hon, at ólavsøkan meira er fyri føroyingar enn fyri ókunnugfólk, sum tey. Eisini rendu tey seg í Paul Watson, og felags fyri nordjobbararnar er, at tey tíbetur hava samhuga við føroyingum í hesum málinum.

– Eftir tíðina í Føroyum havi eg fingið størri innlit í tað, sum rørist í føroyska samfelagnum fyri tíðina, og her er tað serliga spurningurin um sjálvstýri, sum hon nú skilir betri. Hon heldur, at um tað er sjálvstýri, føroyingar ynskja, so eigur eingin forðing at verða fyri tí. Annars kendi hon bara til føroysk viðurskifti gjøgnum donsku fjølmiðlarnar. Eisini heldur hon, at hetta kann verða ein góð barlast at hava seinni í lívinum. Annars er alt tað, hon hevði væntað av túrinum í Føroyum, uppfylt.

Eisini hevur verið skipað fyri Føroya kvøldum, har tey fingu møguleikan at uppliva føroyska mentan, og hetta hevur hjálpt Jette til at síggja sína egnu mentan úr einum ørðum sjónarhorni.



*Jette Rohdin hevur havt sína dagligu gongd á Landssjúkrahúsinum seinastu tveir mánaðirnar* $ **Mynd: Álvur Haraldsen**

### Hvat er Nordjobb?

Nordjobb er ein felagsskapur, sum arbeiðir við at senda ung fólk millum 18 og 26 ár til onnur Norðurlond at arbeiða í eina avmarkaða tíð.

Umsóknir verða sendar til Nordjobb, sum síðani sendir tær víðari til arbeiðsgevarar, og teir kunnu velja onkran av umsøkjarunum burturúr til at arbeiða hjá teimum.

– Fyrimunurin við Nordjobb er, at møguleiki er fyri at uppliva landið á ein annan hátt, enn um farið varð sum ferðafólk. Upplivingin verður meira verulig, tí man er sum ein vanligur borgari í landinum, sigur Jette Rohdin, og hon viðmælir tí øðrum til at royna at fara út við Nordjobb.

Nordjobb byrjaði í 1985, og føroyingar fingu møguleikan í 1987. Tey fyrstu árini vóru nógvir nordjobbarar í Føroyum, og í 1989 vóru heili 89 og arbeiddu her. Talið av nordjobbarum er síðani minkað, men tey seinastu árini hava eini tjúgu nýtt høvi at koma til Føroyar at arbeiða.

Í ár hava 16 nordjobbarar verið í Føroyum, harav vóru átta úr Danmark, fýra úr Svøríki, trý úr Finlandi og ein úr Íslandi, og tey flestu búðu í Klaksvík. Mest vanligi trupulleikin er at fáa eitt stað at búgva, men tað plagar ikki at verða trupult at fáa arbeiði.

Fólk av staðnum við tilknýti til Nordjobb syrgja annars fyri øllum og skipa eisini fyri útferðum og øðrum, tí eitt tað mest umráðandi við Nordjobb er at koma í samband við onnur ung úr Norðurlondum.

*Nordjobbarar í Mykinesi*



*Gustav úr Svøríki, Maja úr Danmark og Petra úr Finnlandi við Mykineshólmi í baksýni*

